# Frí í Føroyum av bakkastokki

**Aftur í ár skipar verður skipað fyri herferðini Frí í Føroyum, hvørs endamál er at eggja føroyingum at ferðast í Føroyum. Skjøtil verður settur á herferðina við tiltøkum í SMS og undir Bryggjubakka komandi vikuskifti**

TÍÐINDASKRIV



*Trælanýpan í Suðuroy er millum annað eitt av ferðamálunum, sum Samvit og Kunningarstovurnar vilja hava føroyingar at vitja*

Á torginum í SMS frá hósdegnum 10. mai til leygardagin 12. mai fara ymsir veitarar innan føroyska ferðavinnu at sýna fram sínar vørur og tilboð. Her verður alt frá kulum festivalum til forvitnisligar bátaferðir og klædnasniðgevar. SamVit (fyrrverandi Ferðaráð Føroya og Menningarstovan) og kunningarstovurnar veita kunning og góð ferðaráð, og aftur í ár verður høvi at hoyra søgur og sagnir í víkingatjaldinum. Ponyríðing við Davidsen-hestum verður á parkeringsøkinum hjá SMS.

G! festivalurin, Summarfestivalurin og Fjarðafestivalurin fara at selja atgongumerki og hava útvald tónleikabrot á innandurapalli. Eitt nú spælir vælumtókti dreingjabólkurin Boys in a Band á pallinum fríggjadagin 11. mai.

Umframt áðurnevndu, luttaka bygdasøvn, flutningfeløg, gistingarhús og matstovur.

Tað verður Elin Heinesen, stjóri á SamVit, ið setur Frí í Føroyum 2007. Setanin verður á torginum hósdagin 10. mai kl. 15 og tá verður eisini annað undirhald á skránni.

Framsýningin er opin hesar dagar:
Hósdag 10. mai kl. 10 – 18
Fríggjadag 11. mai kl. 10 – 19
Leygardag 12. mai kl. 10 – 16

Leygardagin 12. mai verður tiltak undir Bryggjubakka við harmonikutónum, grillaðum fiski, pylsum, kaffi te og køkur. Skiparar úr Vestmanna, Vági og Klaksvík fara at skipa fyri bátaferðum. Eitt nú fer Magni Blástein at gera fiskitúrar, og Birgir Enni sýnir fram nýggja skjóttgangandi taxabátin.

Uttanduratiltakið í Vágsbotni verður einans, um veðrið er til vildar.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin lot av ymsum ættum, seinnapartin frískar hann vindin av eystri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum frostmarkið og +3 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul mest millum norðan og vestan og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum frostmarkið og +4 stig.

**Apríl var ógvuliga lýggjur, miðalhitin bleiv 6,9 stig, móti 4,9 sum er miðal hitin yvir 30 ár.**

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -2 |
| Nuuk | -1 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 10 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 12 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 23 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 23 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 38 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 22 |
| New York | 21 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 985 hPa. eystan fyri Føroyar fer í landsynning og dregur kalda luft av norði móti Føroyum.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Lofoten stendur mestsum í stað og vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft av norði móti Føroyum

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/4 kl. 06[00] – 29/4. 06[00]. Hitin í gjár: 7,5°
Minsti hiti máldur í mai: -9,9° - Mesti hiti máldur í mai: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 19,0 mm – mált frá 21/4 kl. 06[00]– 22/4 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mai: 20,0 mm

## Tiltøk í Miðlahúsinum í mai



**9. mai. Kl. 19.00**
**Aðalfundur í Føroya Astma og Allergifelag**

**15. mai**
**ABC Barnahjálp**

**19. mai**
**Aglow**

**25. mai kl. 15-18**
**Sosialurin 80 ár**

## VESTFALLSKYRRINDI

24. apríl — Fyrra kvarter
30. apríl — Mánin longst frá jørðini
2. mai — Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. Mai | 11.13 | 23.37 | 10.13 | 22.37 | 10.28 | 22.52 | 00.49 | 13.13 | 01.49 | 14.13 | 09.28 | 21.52 | 08.28 | 20.52 | 11.28 | 23.52 | 00.04 | 12.28 | 10.58 | 23.22 | - | 12.13 |
| 8. Mai | - | 12.01 | 11.01 | 23.24 | 11.16 | 23.39 | 01.37 | 14.01 | 02.37 | 15.01 | 10.16 | 22.39 | 09.16 | 21.39 | - | 12.16 | 00.52 | 13.16 | 11.46 | - | 00.37 | 13.01 |
| 9. Mai | 00.24 | 12.48 | 11.48 | - | - | 12.03 | 02.24 | 14.48 | 03.24 | 15.48 | 11.03 | 23.39 | 10.03 | 22.39 | 00.39 | 13.03 | 01.39 | 14.03 | 00.09 | 12.33 | 01.24 | 13.48 |
| 10. Mai | 01.24 | 14.01 | 00.24 | 13.01 | 00.39 | 13.16 | 03.24 | 16.01 | 04.24 | 17.01 | - | 12.16 | 11.16 | 23.51 | 01.39 | 14.16 | 02.39 | 15.16 | 01.09 | 13.46 | 02.24 | 15.01 |
| 11. Mai | 02.36 | 15.12 | 01.36 | 14.12 | 01.51 | 14.27 | 04.36 | 17.12 | 05.36 | 18.12 | 00.51 | 13.27 | - | 12.27 | 02.51 | 15.27 | 03.51 | 16.27 | 02.21 | 14.57 | 03.36 | 16.12 |